# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Hetta er púra burturvið. Hetta er tíðarspilla, og eg skuldi verið fríkendur fyri langari tíð síðani*

*(Peter Brixtofte)*



*Taiyuan í Shanxi-landspartinum er ein av teimum illa dálkaðu kinesisku býunum*

# Nógv vanskapt børn í Kina

**Myndugleikarnir halda, at dálking kann vera orsøkin**

Hagtøl hjá kinesisku heilsumyndugleikunum vísa, at seks prosent av øllum nýføðingum hava eitt ella annað likamligt brek. Eitt nú hava børn fleiri enn tíggju fingrar ella fleiri enn tíggju tær.

Hagtølini vísa, at talið á kinesiskum børnum, sum koma í heimin við einum ella øðrum likamligum breki, er vaksið 40 prosent síðani 2001. Ein orsøk til tann stóra vøksturin er sambært myndugleikunum, at hagtalsskipanin er batnað munandi tey seinastu árini, og at foreldur eru vorðin raskari at boða heilsumyndugleikunum frá, um tey fáa barn við breki.

Men Kina er millum tey mest dálkaðu samfeløgini í heiminum, og tann stóri búskaparligi framburðurin tey seinnu árini hevur avleiðingar við sær. Harafturat hava myndugleikarnir ikki lagt nóg stóran dent á, at tað er neyðugt at verja umhvørvið. Kolið er framvegis tann týdningarmesta orkukeldan í Kina, og fleiri nýggj kolorkuverk eru tikin í brúk tey seinastu árini. Tað krevur, at námsvinnan verður útbygd, og í økjum við kolanámsvinnu eru jørðin og áirnar illa dálkað. Tað er eisini í hesum økjunum, at tey flestu børnini við likamligum breki verða fødd, siga heilsumyndugleikarnir.

Ein uppgerð hjá ST sigur, at 16 av 20 teimum mest dálkaðu býunum í heiminum eru í Kina, og ein kinesisk kanning fyrr í ár vísti, at bara 38 prosent av teimum 585 býunum í landinum lúka altjóða krøv um reina luft.

# Heimsins vandamesta byrging kann bresta

**Verkfrøðingar hjá amerikanska herinum siga, at eitt lítið óhapp kann fáa byrgingina við irakska býin Mosul at bresta, og tað fer at krevja fleiri hundraðtúsund mannalív**

Útrokningarnar hjá amerikonsku verkfrøðingunum siga, at brestur byrgingin, fer ein 20 metrar høg flóðalda at skola oman yvir býin Mosul, har 1,7 mió. fólk búgva.



*Brestur byrgingin við Mosul, kann tað kosta 500.000 mannalív (Mynd: US Army)*

Amerikanska herleiðslan heitti longu í vár á iraksku myndugleikarnar um at tryggja byrgingina við Mosul, men sambært einari frágreiðing, sum blaðið Los Angeles Times hevur fingið fatur á, er at kalla einki gjørt.

Verkfrøðingarnir hjá amerikanska herinum søgdu longu fyri einum ári síðani, at byrgingin við Mosul er tann vandamesta í heiminum. Tað hevði við sær, at amerikanski herovastin í Irak, generalurin David Petraeus, og amerikanski sendiharrin í Bagdad, Ryan Crocker, sendu Nouri Maliki, forsætisráðharra eitt brræv, har teir gjørdu vart við, hvat kann henda, um byrgingin við Mosul brestur.

Í brævinum mettu teir, at ein tílík vanlukka kann kosta 500.000 mannalív. Sambært Los Angeles Times stendur eisini í brævinum, at eitt óhapp við byrgingini kann elva til vatnflóð í Tigris-ánni heilt suðuri við Bagdad.

## STUTT SAGT

### Kostar at fregnast

Tað kostaði amerikanska ríkiskassanum 43,5 mia. dollarar ella 225 mia. krónur at reka CIA og hinar fregnartænasturnar í fjør. Hetta er heldur ikki alt, tí sambært Washington Post umfatar talið ikki útreiðslurnar til ta hernaðarligu fregnartænastuna, og tað kostaði einar 30 mia. krónur at reka hana í fjør, skrivar blaðið. Til sammetingar kann nevnast, at fyri tíggju árum síðani segði táverandi stjórin í CIA, Geroge Tenet, at í 1997 kostaði tað knappar 140 mia. krónur at reka allar tær amerikonsku fregnartænasturnar.

### Kanna fortíðina

Í Týsklandi skipar løgreglan í hesum døgum fyri nøkrum fundum, sum skulu greina fortíðina hjá løgregluni og serstakliga vesturtýsku samveldisløgregluni BKA, sum bleiv stovnað aftan á seinna heimsbardaga. Í seinastuni hava týsk bløð prentað greinar, sum hava avdúkað, at fleiri leiðandi menn í BKA høvdu verið virknir í SS og Gestapo frammanundan. Eitt nú høvdu 33 deildarleiðarar í BKA verið í SS. Ein teirra var Paul Dickopf, sum var ovasti í BKA frá 1965 til 1971 og valdur til formann í Interpol í 1968.

### Kreppa í Nigeria

Eftir áhaldandi trýst í fleiri vikur hevur formaðurin í tjóðártinginum í Nigeria, Patricia Etteh, slakað og lagt frá sær. Millum annað er hon løgd undir at hava brotið vanliga mannagongd í sambandi við, at nakrir bústaðir hjá embætismonnum eru settir í stand fyri einar 25 mió. krónur. Skuldsetingin er óheppin, tí Umaru Yar'Adua hevur sett sær sum mál at beina burtur alla korrupsjón í Nigeria. Hann hevur kortini ikki lagt seg út í stríðið millum tingið og tingformannin.